# tykkið hjá Obama

**Í dag verður Barack Obama tikin í eið sum tann 44. forsetin í USA, og tað er ein sera møtimikil uppgáva, sum stendur fyri framman hjá tí unga forsetanum. Almenna amerikanska skuldin er tvífaldað undir George Bush, og búskapurin stendur fyri álvarsomum hóttafalli. Men tað er júst í slíkum krepputíðum, at tíðin er búgvin at fremja umfatandi reformar, og Obama hevur tí ein gyltan møguleika at gera nakrar búskaparligar broytingar, sum eru alneyðugar í hesum tíðum**

USA

*Stefan í Skorini*
*stefan_skorini@hotmail.com*

Í gjár var seinasti dagur hjá George Bush í teimum hvítu húsunum, og upptakið eftir hann verður stórt. Almenna skuldin er tvífaldað undir Bush-stjórnini, og amerikanski staturin skyldar nú 10,6 billiónir, sum er ein upphædd, ið tey flestu hava ilt við at skilja. Seinastu fýra mánaðirnar hava tvær milliónir fólk mist starvið, og arbeiðsloysið, sum nú er á 7,2 prosent, er á veg uppeftir. Undirskotið á almennu fíggjarlógini hevur eisini verið stórt, meðan Bush hevur sitið við stýrisvølin, og reyðu tølini hava ikki sæð sín líka síðan seinna heimsbardaga.

Ein tann fremsta orsøkin til undirskotið er, at Bush hevur latið stórar skattalættar, sum ikki hava verið fíggjaðir við øðrum inntøkum, og eitt kríggj í Irak, sum hevur kostað statskassanum nógvan pening. Bush arvaði eitt lítið yvirskot á fíggjarlógini frá Bill Clinton, ið hann legði stóran dent á at náa, men hetta yvirskotið er vent til eitt metstórt undirskot, og Bush fer úr teimum Hvítu Húsunum sum tann mest ópopuleri forsetin í nýggjari tíð, hóast hansara undirtøka er batnað nakað síðan valið.

Barack Obama arvar eina katastrofala búskaparstøðu, og hansara politiska sveinastykki verður tí at fáa búskapin aftur á beint, og tað verður ikki nøkur løtt uppgáva.

## Bjargingarpakkin

George Bush hevur longu sett ein bjargingarpakka í verk, sum hevði til endamáls at bjarga fíggjarkervinum. Hesin kostaði 168 milliardir dollarar, men tað skal eftir øllum at døma sterkari lútur til. Tí hevur Barack Obama boðað frá, at hann fer at seta í verk eina stóra bjargingarætlan. Hendan ætlanin fer væntandi at kosta eini 800 milliardir amerikanskar dollarar og kann gerast enn størri.

Enn hevur Obama ikki sagt nágreiniliga, hvussu bjargingarpakkin skal skrúvast saman, men hann hevur tríggjar høvuðsættir. Fyrsti táttur er at lata pening til teir einstøku statirnar og lokalar myndugleikar, sum skal forða fyri, at hesir fara at hækka skattirnar og at skerja almennar tænastur. Annar táttur er at lata pening til fólkið, sum síðani fer at nýta hann til forbrúk. Hetta verður framt ígjøgnum skattalættar til lág- og miðalinntøkur umframt hægri arbeiðsloysisstuðul og heilsutænastur til arbeiðsleys og láglønt, sum ikki hava ráð til sjúkratrygging. Grundleggjandi hugsanin er, at tá tú letur skattalættar fyri at stimulera búskapin, er best at lata hann til fólk, ið ikki hava ráð til at spara hann upp, men heldur fara út og brúka pengarnar. Harumframt inniber pakkin møguliga skattalættar til vinnulívið. Triði tátturin í bjargingarpakkanum inniber, at tað almenna fremur almennar verkætlanir í serliga infrastrukturin fyri at skapa nýggj størv. Amerikanarar fáa harvið sín egna asfaltfestival við stórum íløgum til eitt nú nýggjar vegir. Obama hevur nevniliga boðað frá, at staturin skal skapa fýra milliónir nýggj størv áðrenn 2010 er runnið. Hetta er ein sera ambitiøs ætlan, ið fleiri serfrøðingar ivast stórliga í. Harumframt er ætlanin at investera 150 milliardir dollarar í grøna og burðardygga orku komandi tíggju árini.

Trupulleikin við einum slíkum bjargingarpakka, ið hevur til endamáls at stimulera búskapin, er, at tann frammanundan ovurstóra almenna skuldin kann gerast enn størri. USA eigur nevniliga ikki hesar 800 milliardirnar á bók. Tað verða tí framtíðar ættarlið, ið skulu rinda tær útreiðslurnar, ið staturin átekur sær nú, og fleiri politikarar í Washington hveppa seg við at halda áfram við ovurstórum undirskoti á fíggjarlógini og eini vaksandi almennari skuld.

## Bjartskygni

Hóast USA gongur eini daprari tíð í møti við búskaparkreppu og ótryggleika hjá vanliga borgarunum, er fólkið merkiliga bjartskygt um framtíðina. Í eini meiningakanning í New York Times sigur 80 prosent av fólkinum, at tey hava bjartar vónir um framtíðina undir Barack Obama, sum fær tvey ár til at fáa skil á trý tey størstu málini í amerikanskum politikki: Búskapin, trupulleikarnar í heilsuverkinum og kríggið í Irak.

Obama skuldi havt góðar fortreytir fyri at náa teimum málum, ið hann setur út í kortið, av tí at demokratarnir í løtuni hava meiriluta í báðum húsunum í Kongressini. Men tað verður tó ein stór avbjóðing at fáa stuðul frá Kongressini til tær stóru broytingarnar, tí hóast demokratarnir hava meirilutan í bæði Senatinum og Umboðsmannatinginum, skulu bert nakrir fáir demokratar hoppa frá, áðrenn Obama fær ein meiriluta ímóti sær, og tað kann løttliga henda, um demokratarnir í Kongressini ikki fáa nóg stóra ávirkan á tann førda politikkin.

Fleiri eygleiðarar meta tó, at í slíkum krepputíðum er tað mangan løttari at fáa politiska undirtøku fyri meira umfatandi reformum, sum møguleiki ikki er at fremja í "friðartíð".

Dagsins kreppustøða í USA er tí ein politiskur møguleiki hjá komandi forsetanum, skrivar Robert Samuelson í Washington Post. Hann samanber Obama við Ronald Reagan, sum fekk ovurstóra fólksliga undirtøku, m.a. tí at hann í eygum veljarans hevði fingið búskapin aftur á rættkjøl og syrgt fyri búskaparligum tryggleika eftir nógv ár við ovurstórari inflatión. Um Obama tí megnar at fáa skil á búskapin og skapa vón fyri eini bjartari framtíð, er stórur møguleiki fyri, at hann heldur fram í forsetaembætinum um fýra ár.

## Stórar kreppur skapa stórar forsetar

Eingin ivi er um, at fólkið í USA metir, at búskapurin er tað mest týdningarmikla málið at loysa. Meira enn helmingurin heldur, at búskapurin skal standa ovast á breddanum hjá nývalda forsetanum, meðan bert umleið tíggju prosent halda, at kríggini í Irak og Afghanistan hava størst týdning.

John Judis frá tíðarritinum, New Republic, metir, at Barack Obama skal handla skjótt, um hann ikki skal gerast eitt stórt vónbrot hjá veljarunum.

Stórar kreppur skapa stórar forsetar. Tað er í krepputíðum – antin av krígsávum ella búskaparligum turbulensi – at teir stóru forsetarnir verða skaptir. Tí minnast vit Roosevelt, Truman, Johnson, Nixon og Reagan. Bill Clinton iðraði seg altíð um, at hann ongantíð fekk nakra stóra kreppu, sum kundi givið honum mandat til nakrar umfatandi reformar. Obama hevur hendan møguleikan, sigur John Judis.

Eingin ivi er um, at Barack Obama situr við einum stórum mandati til at fremja umfatandi broytingar í amerikanska samfelagnum – bæði víðvíkjandi heilsuverkinum og skattapolitiskt, har Barack Obama hevur ætlanir um at "spjaða ríkidømi". Bill Clinton hevði t.d. stórar ætlanir um almenna sjúkratrygging, men hann varð steðgaður av einum republikanskum meiriluta í Kongressini. Hesa forðing hevur Obama hinvegin ikki (enn í øllum førum), og nú bíða amerikanarar og ikki minst restin av heiminum eftir, hvussu Obama fer at umsita sítt søguliga mandat til at fremja tær neyðugu broytingarnar, tí tá USA hostar, fær restin av heiminum krím.



*Barack Obama avmyndaður á russisku trædukkuni 'Matryoshka' á einum uttandura sølutorgi í bulgarska høvuðsstaðnum, Sofia*
*Mynd: AP Photo/Petar Petrov*